# - Hyggja automatiskt

**Í skýmingini leygardagin avbyrgdu trý skalvalop fólkið í Kunoy frá sambandi við umheimin. - Tíbetur var einki fólk á vegnum, tá skalvalopið kom. Men ein krevur at koyra við varsemi, sum ein kunoyingur tók til, tá vit vitjaðu í bygdini fyrrapartin í dag.**

SKALVALOP
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*myndir: Høgni Thomsen*

**Kunoy:** Tað var eitt stórt framstig fyri kunoyingar, tá teir í 1988 fingu samband við umheimin gjøgnum Kunoyartunnilin.

Á fyrsta sinni varð nú koyrandi til Klaksvíkar við bili eftir Kunoyarvegnum. Og hetta hevur hildið lív í bygdini.

Hinvegin so hava kunoyingar altíð havt eitt vakið eyga við bróttu líðunum í erva, tá teir eru farnir til ella úr bygdini.

Teir vita, at sama árið sum tunnilin lat upp var eitt rættiliga stórt skalvalop nærhendis bygdini. Og fyrradagin hendi tað sama aftur.

Eingin vil tó siga, at tey óttast at koyra eftir Kunoyarvegnum. Men sum ein kunoyingur tók til í morgun:

- Nú fara vit helst at hyggja eitt sindur oftari niðan í líðina, - í øllum førum ta fyrstu tíðina!

**Líkindi fyri lopi**
Tað var í skýmingini seinnapartin leygardagin at fyrsti skalvurin leyp. Og sum skilamenn greiða frá, er kavafyltar líðir.

Allan leygardagin var veðrið soleiðis, at góður møguleiki var fyri at eitt slíkt lop kundi koma á júst hesum staði, har tað bæði er bratt og har tað kann leggjast nógvur kavi.

Dagurin byrjaði við regni og vátaslettingi, og haraftrat var hitin nakað væl omanfyri frostmarkið. Líkt er til, at blot er komið í tann nógva kavan í Bratarsgili, og síðani er fyrst eitt, og eftir tað tvey lop aftrat farin oman líðina.

Tíbetur var einki fólk á vegnum tá skalalopini komu, men sum skilst á fólki í Kunoy var ein bilur farin til Klaksvíkar stutt frammanundan.

Onkur kunoyingar skuldi við dansifelagnum í Klaksvík til Sumbiar at dansa leygarkvøldið. Hesin mátti kortini setast aftur, tí ikki slapst av bygdini.

**Fleiri lop í væntu**
Hóast keðiligu veðurlíkindini, vistu nógv fólk ikki av hesum skalvalopinum, fyrrenn tey hoyrdu tað verða nevnt í útvarpinum.

Seinnapartin leygardagin brutu teir nevniliga eina sending av, og boðaði fólki frá at Kunoyarvegurin var stongdur orsakað av skalvalopi ella skalvalopum.

Í eini áheitan var heitt á fólk um ikki at fara til staðið. Hjá teimum var tað helst so, sum orðatakið sigur: Har ein skriðan er lopin, er onnur væntandi.

Tað var haraftrat vorðið myrkt, og illa bar til hjá staðkendum og skilafólki at meta um, hvørt eitt lop mundi fara at koma aftrat.

Eingin visti at siga, hvussu sá út við kava í erva, og tí ráddu teir hjá Landsverki fólki fólki frá at koyra eftir Kunoyarvegnum. Vegurin varð stutt sagt stongdur fyri allari ferðslu.

> ” *Eingin visti at siga, hvussu sá út við kava í erva, og tí ráddu teir hjá Landsverki fólki fólki frá at koyra eftir Kunoyarvegnum. Vegurin varð stutt sagt stongdur fyri allari ferðslu.*

Teir vóru eisini greiðir um, at fóru teir hinvegin at rudda ov mikið, so kundi kanska vandi verða fyri at aðrar skriður fóru at leypa.

Onkrir kunoyingar koyrdu kortini niðan ímóti staðnum, har skalvalopið var. Har var kortini einki at síggja í myrkrinum, burtursæð frá ljósunum hinumegin lopið líkt til at hini bæði lopini eru komin aftaná við stuttum millumbilum.

- Tað eru altíð bilar eftir Kunoyarvegnum. Og soleiðis kann ein rokna við, at tey eru komin mestsum ísenn, greiðir Jaspur frá.

At skalvalopini komu henda seinnapartin, er helst ikki komið óvart á tey, ið kenna væl til viðurskiftini millum avfall, lýðku og



*Hetta skalvalopið var munandi størri enn tað sum var í februar mánaði 1988*
*Mynd: Høgni Thomsen*